# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Frálíkt tiltak

Hetta er tíðin, tá føroyingar kring alt landið seta álit sítt á kortini mangan svikaliga veðrið og seta út í kortið mong fjølbroytt útitiltøk. Eitt teirra fór fram seinasta vikuskifti. Og tað eigur Føroya Ríðingarfelag rós uppiborið fyri. Fá tiltøk her á landi munnu gleða børnini so nógv sum afturvendandi árliga tiltakið hjá Føroya Ríðingarfelag úti í Havnardali. Eingin ivi mundi vera um hetta sunnudagin, tá túsundtals børn úr øllum landinum hugnaðu sær saman við mongu djórunum – ein fullkomiliga øðrvísi dagur enn tann hesi børn og tey ungu uppliva annars fyri tað mesta innandura, frammanfyri telduna.

Føroyingar eru heimsmeistarar í at skipa fyri tiltøkum av alskyns slag, og hetta var so bert eitt av teimum mongu. Ikki tí at tað er serliga hugaligt at skipa fyri útitiltøkum, tá tú ongantíð kanst kenna teg vissan í, at veðrið verður til vildar. Men løgið nokk, so livir vónin alla tíðina um, at tað man fara at ganga. Kanska verður tað ikki so galið kortini. Føroyingar munnu vera heimsins mest tolna fólk.

Seinasta vikuskiftið var av teimum allarbestu nakrantíð. Sunnudagin var so sjáldsama gott veður, at fólk úr øllum landinum høvdu leitað sær út í Havnardal til stórt djóratiltak at gleðast saman við børnunum.

Vit kunnu bert fegnast um, at áhugafeløg av ymsum slag taka stig til slík góð tiltøk, og vit fara í hesum føri at ynskja Føroya Ríðingarfelag góða eydnu við nýggju høllini, sum verður bygd. Ein íløga í at troyta okkara vøkru náttúru og livandi djóraverð er nakað, sum vit øll eiga at fegnast um, tí hon kann geva so mongum fleirfalt aftur. Við vón um at vit fáa eitt gott summar og harvið væleydnað útitiltøk og tøkk til tykkum mongu, ið brúka nógva orku og kreftir til at skipa fyri. Her hugsa vit eisini um mongu stevnurnar, sum standa fyri framman og um spennandi tónleikafestivalarnar í summar.

**Sosialurin**

## Semja millum FSN og Fiskimálaráðið

TÍÐINDASKRIV

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Eyðstein Djurhuus, form.

Rættarmálið millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag (FSN) og Fiskimálaráðið er endað við semju millum partarnar. Í hesum tíðindaskrivi verður greitt frá, hví málið er endað, uttan rættarúrskurð.

**Hví varð málið reist?**
Eftir óhappið, sum Norrøna var fyri 15. jan. 2004, setti Skipaeftirlitið eina kanning í verk av hesum óhappi. FSN metti, at eingin heimild var at gera eina slíka kanning, og vit mótmæltu hjá landsstýrismannninum í fiskivinnumálum. Hóast okkara mótmæli bleiv kanningin framd. FSN setti ein óheftan serfrøðing at gera viðmerkingar til kanningina. Hann vísti á fleiri feilir og brek við kanningararbeiðinum. Tí avgjørdi FSN at stevna Fiskimálaráðnum fyri at fáa hesa kanning dømda fyri at vera ógilduga, og harvið eisini tær niðurstøður, sum hon kom fram til.

**Støðan er broytt**
Ólavur Hovsgarð, sum var skipari á Norrønu, tá óhappið hendi, hevur avgreitt øll síni viðurskifti við sín fyrrverandi arbeiðsgevara. Henda hending hevur merkt hann rættiliga nógv, og hann hevur eitt ynski um at koma víðari í lívinum.

Landsins myndugleikar hava víðar heimildir at áleggja skiparum bøtur, um teir fremja nakað brot á sjólógina ella kunngerðina um vaktarhald á skipum. Vit vilja vísa á, at Ólavur Hovsgarð onga slíka sekt hevur fingið.

Vónandi fara fjølmiðlar at hava virðing fyri, at hann vil leggja hetta málið aftur um seg. Møguligir spurningar skulu setast felagnum.

Nevndin í FSN hevur umhugsað hetta mál gjølla. Vit hava sett okkum spurningin, hvat kunnu vit fáa burtur úr einum slíkum rættarmáli, ella kunnu vit fáa meiri burturúr á annan hátt?

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum arbeiðir nú við at gera eina nýggja kunngerð um kanningar av vanlukkum á sjónum. FSN hevur latið viðmerkingar inn til nevndu kunngerð. Felagið tekur undir við, at vanlukkur og størri óhapp verða kannað til fulnar. Men tað er av størsta týdningi, at hetta verður gjørt undir skipaðum viðurskiftum. Rættartrygdin hjá teimum persónum, sum verða kannaðir, eigur at vera vard. Felagið hevur fingið eina tilsøgn frá landsstýrismanninum um, at okkara sjónarmið eisini verða tikin við, tá tann endaliga kunngerðin verður orðað.

**Allir partar hava lært**
Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ger nú eina nýggja kunngerð, og tað er ein viðurkenning, at støðan sum hon nú er, má broytast.

Stjórin á Skipaeftirlitinum hevur sagt í miðlunum, at teir hava lært nógv av óhappinum hjá Norrønu. Her kann nevnast, at allir upplýsingar verða fingnir til høldar, og at kanningin ikki skal almannakunngerast, áðrenn partarnir hava havt høvi at gera sínar viðmerkingar.

Tað er at fegnast um, at Smyril Line nú vísir nógv størri varsemi, tá Norrøna skal leggja at í ringum veðri. Vit fegnast eisini um, at ferðafólk skilja, at neyðugt er at laga seg eftir umstøðunum. Eisini eru ábøtur gjørdar í Tórshavnar Havn.

FSN hevur lært, at tað er trupult at tryggja, at limir okkara fáa eina virðiliga viðferð, tá kanningar verða gjørdar. Vit mugu tí ávirka myndugleikarnar soleiðis, at karmarnir kring hesar kanningar eru nøktandi fyri limir okkara.

Ólavur Hovsgarð gjørdi tað, sum hann kundi fyri at bjarga skipi, manning og ferðafólki, tá skipið kom illa fyri, orsakað av óvæntaðum umstøðum. Niðurstøðan í kanningini sigur, at hetta var ein medvirkandi orsøk til óhappið. Hetta er sera trupult at fáa at vita hjá einum, sum altíð hevur røkt sítt arbeiði við størstu ábyrgd. Vit skilja væl, at ilt er at fóta sær aftur eftir slíkt.

**Criminalization of seafarers**
Soleiðis verður hetta fyribrigdi nevnt í altjóða orðaskifti um sigling og sjóvinnu. Tað er, at sjómenn, sum útinna eitt lógligt og erligt arbeiði, verða viðfarnir sum stórbrotsmenn, tá okkurt gongur galið, ella okkurt smávegis brot er framt á onkra reglu.

Sigling og fiskiskapur eru sera týðandi vinnugreinir í føroyska samfelagnum. Myndugleikarnir eiga at smíða lógir og kunngerðir, soleiðis, at havt verður í huga, at sjómenn arbeiða ofta undir nógvum trýsti og undir vánaligum umstøðum.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag er í ár vertur fyri Nordisk Navigatørkongress. Hesin fundur verður hildin 7. og 8. juni. Tá fara øll tey norðurlendsku navigatørfeløgini at umrøða mál av felags áhuga. Eitt mál, sum er sett á skránna, er júst hetta, hvussu skiparar og stýrimenn frægast verða vardir, tá ið óhapp og vanlukkur skulu kannast.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.